Rok hjá Liverpool

Tað spældi alt annað enn friðarligt av, tá Liverpool var í Portugal, har teir fyrireika seg til Champions League dystin móti Barcelona. Millum annað endaðu Craig Bellamy og John Arne Risse hálva vegna í bardaga, og eisini vilja miðlar vera við, at málverjin, Jerzy Dudek, varð tikin av løgregluni. Rafael Benitez, venjari, vil ikki gera ítøkiliga viðmerkingar til hendingarnar. Men hann staðfestir, at hann hevur gjørt spælarunum púrasta greitt, at tað fylgir ein ábyrgd við, tá spælt verður fyri eitt siðvant felag.

Inniróður verður 24. febrar

Óalmenna FM-kappingin í inniróðri verður í Havn tann 24. februar. Tað er Havnar Róðrarfelag, sum í samstarvi við Kall skipar fyri kappingini, ið hevur fingið heitið Kall-kappingin. Fyri at økja um áhugan, verður kappingin í ár skipað í fleiri aldursbólkum, eins og ein serstøk kvinnustafett hesa ferð verður á skránni.

Steypavinnarar 2007, Dráttur

Standandi eru Sólgerð Henriksen, Helga Nordendal, Torgunn Jónsdóttir, Hervør Hansen, Rannvá Ólavsdóttir, Miriam Weihe, Elspa Suffía Joensen, Elisabeth S. Rasmussen, venjari og Gerda Nattesta, liðleiðari. Sitandi eru Anly S. Joensen,. Kristina S. Joensen, Elin Akselsen, Ruth Thomassen og Torgunn Jónsdóttir

Mynd: Álvur

Steypavinnarar 2007. Mjølnir

Standandi eru Trygvi Poulsen, venjari, Jón Syderbø, Thorvald Danielsen, Gunnar Jørgensen, Hjalti Josephsen, Hanni Niclassen, Bárður S. Venned og Karstin Joensen. Sitandi eru Leif á Stongunum, Rúni Elttør, Bogi H. Isaksen, Vladimir Vassilev, Eyðstein Elttør

Mynd: Álvur

StÍF-Stjørnan 13-20 (7-10):

Meistararnir gjørdu arbeiðið

Uttan at tær nakran tíð spílaðu seg út, tók Stjørnan tvey trygg stig við sær av Skála leygardagin

KVINNUHONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Ivaleyst sat tað í høvdinum á Stjørnu-spælarunum, at tær sunnudagin høvdu dyst, sum í øllum førum á pappírinum var truplari enn tann, sum liðið skuldi spæla á Skála.

Av tí sama gjørdist ferðin heldur ongan tíð tann heilt stóra í dystinum. Uttan veruliga at spíla seg út, so var Stjørnan heilt greitt betra liðið, og tó at vertirnir royndu at fylgja við, so var avmarkað, hvat tær megnaðu móti yvirveldinum.

Spakuliga men trygt togaði Stjørnan seg eisini frá StÍF, og var nakað av spenningi, so hvarv hesin fyrstu løtuna eftir steðgin. Stjørnan leyp tá sjey mál framum, og so var púrasta leyst og liðugt hjá oddaliðnum, sum seinastu løtuna kundi flyta tankarnar ein dag og eina uppgerð fram.

FAKTA

StÍF-Stjørnan 13-20 (7-10)
Málskjúttar
StÍF: Rebekka Justinussen 6, Ninna K. Johansen 3(1), Malan Petersen 1, Rósa Johansen 1, Bára B. Danielsen 1, Fríðrun Danielsen 1
Stjørnan: Simona Petersen 5(1), Louisa Andreasen 5, Joan Midjord Djordjevic 4, Hanna Mikkelsen 2, Edith Hansen 2, Anna Kristina Samson 1, Una Olsen 1
Brotskøst: StÍF 4, Stjørnan 3
Útvísingar: StÍF 4, Stjørnan 4
Dómarar: Hannis Wardum & Uni Wardum.

SUNSET KAPPINGIN KVINNUR

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Stjørnan	6	6	-	0	-	0	357	278	79	18
2 Neistin	6	4	-	0	-	2	371	316	55	15
3 VB	6	3	-	0	-	3	353	344	9	10
4 StÍF	5	1	-	0	-	4	279	361	-82	4
5 Kyndil	5	0	-	0	-	5	298	359	-61	2

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN MENN

Atlantic Airways-kappingin

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 VÍF	6	3	-	1	-	2	492	448	44	16
2 Kyndil	6	4	-	1	-	1	467	445	22	13
3 Neistin	6	2	-	1	-	3	484	463	21	11
4 StÍF	6	2	-	0	-	4	432	432	0	11
5 KÍF	6	3	-	2	-	1	424	441	-17	11
6 H71	6	1	-	1	-	4	438	508	-70	6